# Landssjúkrahúsið gjørt góða avtalu við Ríkissjúkrahúsið

**– Tað er ógjørligt at útvega patolog og tí hava vit gjørt samstarvsavtalu við Ríkissjúkrahúsið. Men tað ger okkum ikki verri fyri, sigur Anna Grethe Mikkelsen, læknastjóri**

HEILSUVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*



*– Vit hava gjørt eina avtalu við Ríkissjúkrahúsið sum ger, at vit ikki vera verri fyri, enn vit hava verið, sigur Anne Grethe Mikkelsen, læknastjóri á Landssjúkrahúsinum*

Nú er ongin patologur longur á Landssjúkrahúsinum.

Patologurin sum var, Mogens Egholm, legði frá sær fyrsta mai og tí hevur verið neyðugt at umskipa virksemið á Landssjúkrahúsinum.

Tað kemur ikki óvart á leiðsluna fyri Landssjúkrahúsið, at hann leggur frá sær, tí tað eru nú fleiri ár síðani, at hann fór frá fyri aldur, men kortini hevur hann arbeitt í fleiri ár, men fyrsta mai legði hann so endaliga frá sær.

Men tað hevur verið ógjørligt at fáa nakran patolog á Landssjúkrsahúsið at taka starvið eftir hann.

– Hetta er ikki nakað serstakt fyribrigdi fyri Landssjúkrahúsið. Tað eru ógvuliga fáir patologar til so tað eru mong sjúkrahús ymsastaðni, sum ikki fáa patologar, sigur Anne Grethe Mikkelsen, læknastjóri á Landssjúkrahúsinum.

Patologar gera nógv ymisk arbeiði. Tað eru m.a. teir, ið kanna royndirnar, ið verða tiknar í teimum fyribyrgjandi kanningum, sum verða gjørdar av kvinnum. Teir kanna eisini royndir ið verða tiknar av vevnaði og blóði fyri at vita, um sjúka er uppi í og tá ið umstøðurnar tala fyri tí, eru tað teir, ið kanna lík fyri at vita, hvør deyðsorøkin er.

– Tað er stórur tørvur á patologum runt um. Í Danmark er bara 70% av tørvinum nøktaður og tað er onki sum bendir á, at hetta fer at broytast framyvir, sigur Anne Grethe Mikkelsen, læknastjóri á Landssjúkrahúsinum í Havn.

### Góð samstarvsavtala

– Tann partin av patologiska arbeiðnum, sum er at kanna deyðsorsøkina, kann ikki longur verða gjørd á Landssjúkrahúsinum.

– Men er tað neyðugt, ber altíð til at fáa ein patolog uttan eftir at gera tað.

Er talan hinvegin um rættarliga patologi, tvs, at kanna lík, tá ið illgruni er um brotsverk, er ikki loyvt at brúka egnar patologar, tí tá koma altíð rættarligir patologar uttaneftir.

Fyri at nøkta tørvin á patologiskum kanningum annars, hevur Landssjúkrahúsið tí gjørt eina avtalu við Ríkissjúkrahúsið.

– Hetta er ein góð avtala sum ger, at vit í framtíðini ikki vera verri fyri, enn vit hava verið, sigur Ane Grethe Mikkelsen.

Hon sigur, at eftir avtaluni verða royndirnar, sum verða tiknar í Føroyum, pakkaðar og sendar á Ríkissjúkrahúsið og so fáa vit svar í faxi í seinasta lagi tríggjar dagar eftir.

### Býta útreiðslurnar

Ein annar partur av patologiska arbeiðnum er at kanna royndir, sum verða tiknir av sjúklingum ímeðan teir liggja undir skurði.

Men eisini tað er avtala gjørd við Ríkissjúkrahúsið um, so at Landssjúkrahúsið útvegar sær útgerð til telemedisinska útgerð, tvs, at myndir av royndunum verða fluttar niður á Ríkissjúkrahúsið elektroniskt.

– Tað merkir, at tá ið royndir verða tiknar av sjúklingum, sum liggja undir skurði, verða teir lagdur undir mikroskopið og so kunnu patologarnir á ríkkissjúkrahúsinum síggja royndirnar samstundis, sum tey í Havn og koma til eitt úrslit beinanvegin. Tað ber eisini til at tosa ímillum starvsfólkið í Havn og á Ríkissjúkrahúsinum.

Anne Grethe Mikkelsen sigur hendan tænastan frá Ríkissjúkrahúsinum er ókeypis.

Útgerðin til hesa telemedisinsku útgerðina kostar 1,4 millión, men av teimum rindar Ríkissjúkrahúsið 900.000 krónur og vit betala 500.000 krónur.

– Hetta ger Ríkissjúkrahúsið til tey fegin vilja hava hesa tænastuna og útgerðin kann eisini brúkast til onnur sjúkrahús.

Hon sigur, at av tí, at trotið á patologum er so stórt, er gongdin nú tann, at patologi verður savnað á miðdeplum, sum fleiri sjúkrahús so brúka.

Hon sigur, at samstundis, eru laborantar á Landssjúkrahúsinum útbúnir til at arbeiða undir nýggju skipanini.

– Tað, sum vit hava gjørt, er at brynja okkum út til framtíðina, leggur hon afturat.

Anna Grethe Mikkelsen sigur, at avtalan við Ríkissjúkrahúsið ger, at Landssjúkrahúsið er ikki verri fyri, enn tað var frammanundan.

– Orsøkin til, at vit hava valt Ríkissjúkrahúsið, er at vit senda teir allarflestu av okkara sjúklingum á Ríkissjúkrahúsið og tað samstarvið eru vit sera væl nøgd við. Og tá er tað ein fyrimunur at patologisku royndirnar eisini verða gjørdar á sama sjúkrahúsið, so at alt er undir sama taki.

# Ikki dropin eftir í Suðuroy

**Verkfallið hjá Skipara- og Navigatørferlagnum nú eisini ført við sær, at eisini Suðuroyggin er blivin púra turrløgd fyri dieselolju**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*




*Hetta skelti hongur nú á besinstøðunum í Suðuroy. Verkfallið ger, at ongin diselolja til bilar er eftir í oynni*

**Suðuroy:** Avleiðingarnar av verkfallinum, hjá Skipara og Navigatørfelagnum verða meiri og meiri sjónligar. Og enn sum áður, er tað útjaðarin í Føroyum, sum er harðast raktur, samstundis sum alt gongur sína púra vanligu gongd í miðstaðarøkinum.

Fyri nøkrum døgum síðani var bæði olja og bensin uppi í Vágum.

Men nú eru bilar, ið brúka diesel, eisini av álvara farnir at fækkast á vegunum í Suðuroy, tí nú er heldur onki auto-diesel eftir har.

Tað er meiri enn ein vika síðani, at dieseloljan til bilar var uppi í syðru helvt í Suðuroy, men nú er er tomt allastaðni í oynni.

Onkrar støðir høvdu eitt sindur eftir í gjár, men tey væntaðu, at tað fór at vera uppi, sum dagurin leið.

Hinvegin er ongin vandi fyri at goymslurnar av bensini og gassolju til húsarhald, fara at ganga undan.

Orsøkin til, at dieseloljan til bilar er farin at ganga undan, er, at ongin goymsla er til hesa oljuna í oynni.

Shell og Statoil senda tangabilar norður um fjørð við Smyrli, tá ið tørvur er á tí, men tað ber ikki til, so longi verkfallið hevur lagt Strandferðsluna lamna.

Hinvegin eru goymslur til bæði bensin og gassolju til húsarhald, so tað fer ikki at ganga undan.

Bæði Statoil og Shell siga, at dieselolja til bilar er ikki tað sama, sum gassolja til húsarhald, hóast nógv halda tað.

Viðhvørt hevur verið brúkt at koyra gassolju til húsarhald í tangan í bilinum, men tað er avgjørt ikki ráðiligt nú.

– Nógvir persónbilar hava so fíntfølandi motor, at teir tola als ikki gassoljuna, siga Tummas Thomsen á Shell í Suðuroy.

Tað er eitt sindur øðrvísi við lastbilum, men hann sigur, at tað avgjørt er fyri egnu ábyrgd, at gassolja verður koyrd í tangarnar, tí teir mæla ikki til tað.

Bæði Statoil og Shell siga, at har koyra tey ikki gassolju í tangarnar á bilunum, men hvat fólk gera sjálvi, stendur fyri egnu ábyrgd.

Annars ljóðaði í gjáramorgum, at ein tangabátur skuldi koma suður við dieselolju til bilar, men ongin visti, nær tað for at vera.

Men hetta vita oljufeløgini onki um.

– Tað eru ongar ætlanir um at senda bát suður við autodiesel, sigur Hákun Djurhuus á Føroya Shell og tað sama sigur Hans Waag á Statoil.



Tórfinn Smith uppí samgonguna:

# Onga ávirkan sum andstøðulimur

**– Tú kanst í roynd og veru ikki nýta andstøðusessin til nakað serligt, sigur Tórfinn Smith, sum nú er vorðin limur í býráðssamgonguni í Tórshavnar býráð**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Heri á Rógvi*



*– Tíðin er farin frá hesum taktiska politiska spælinum. Eg haldi, at veljararnir hava uppiborið meira, soleiðis at teir kunnu fáa ávirkan gjøgnum sína atkvøðu, sigur Tórfinn Smith, sum er farin uppí samgonguna í Tórshavnar býráð*

**Tórshavn:** Tórfinn Smith hevur gjørt av taka úr andstøðuni í Tórshavnar býráð og fer uppí samgonguna. Í samgonguni eru Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin. Teir eiga tilsamans átta býráðslimir. Í andstøðuni er Tjóðveldisflokkurin við trimum limum og Javnaðarflokkurin við teimum báðum Elin Lindenskov og Tórfinn Smith. Sostatt er býtið millum andstøðu og samgongu átta móti fimm, men ein broyting er á veg.

Á býráðsfundi mikukvøldið verða munandi broytingar gjørdar í nevndunum hjá Tórshavnar Býráð, tí samgongan við Tórfinn Smith nú eigur so stóran meiriluta, at teir eiga fýra av fimm nevndarlimum í hvørjari nevnd.

### Riggar ikki

Tórfinn Smith sigur um sína avgerð, at hann kendi seg noyddan at taka hesa avgerðina, tí hann heldur ikki, at hann fær mógmikið burturúr sum limur í andstøðuni.

– Tú kanst í roynd og veru ikki nýta andstøðusessin til nakað serligt, sigur Tórfinn Smith.

Hann greiðir frá, at teir longu eftir valið fyri góðum hálvumøðrum ári síðani royndu at skipa tað soleiðis, at ikki skuldu sita uttanfyri í einari møguligar samgongu, tí støðan hjá Javnaðarflokkinum var tann, at teir illa kundu vera við í einari møguligari samgongu við sínum tveimum býráðslimum. Hann kallar tað, at sita í andstøðu, fyri eina troystarleysa oyðimarkargongd.

– Eg haldi, at mínir veljarar hava uppiborið betri. Teir vilja heldur hava, at eg kann hava eina ávirkan á politikkin, tí sum andstøðulimur fært tú næstan einki gjørt, sigur Tórfinn Smith.

Hann fekk tilboðið um at koma við í samgonguna longu tíðliga í ár, men hevur ikki vilja tikið av. Tilboðið var bara galdandi fyri hann og ikki fyri Elin Lindenskov, sum jú er hitt umboði í Býráðnum fyri Javnaðarflokkin.

– Tíðin er farin frá hesum taktiska politiska spælinum. Eg haldi, at veljararnir hava uppiborið meira, soleiðis at teir kunnu fáa ávirkan gjøgnum sína atkvøðu, sigur Tórfinn Smith.

### Formaður

Sum nýggjur limur í samgonguni í Tórshavnar býráð gerst Tórfinn Smith formaður í umhvørvis- og heilsunevndini hjá Tórshavnar býráð. Hann verður eisini limur í sosialunevnd. Hann varðveitur nevndarsessirnir í havnanevndini og mentanarnevndini.

Tórfinn Smith hevur ongar ætlanir um at taka seg úr Javnaðarflokkinum. Hann hevur enn ikki gjørt av, um hann stillar upp til komandi kommunuval.

Tórfinn Smith varð fyrstu ferð valdur í Tórshavnar býráð í 1984. Hann varð ikki afturvaldur, men tá Svend Aage Andersen andaðist í 1989, so kom hann inn aftur í býráðið. Hann er valdur aftur á øllum valum síðani tá. Hann hevur verið umboð fyri Javnaðarflokkin saman við Elini Lindenskov síðani 1992.

Elin Lindenskov:

# Vit eru eingin bólkur longur

**– Eg fari ikki at stilla upp saman við Tórfinn Smith aftur, sigur Elin Lindenskov, býráðslimur fyri Javnaðarflokkin**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Heri á Rógvi*



*– Hetta er skaðandi fyri umdømið hjá Javnaðarflokkinum og skaðandi fyri samstarvið í andstøðuni. Vit eru vald fyri Javnaðarflokkin og skulu umboða flokkin, sigur Elin Lindenskov*

**Tórshavn:** Elin Lindenskov er ikki fegin um nýkomnu støðuna, har hon nú er vorðin einsamalt umboð fyri Javnaðarflokkin í andstøðu í Tórshavnar býráð. Hennara partamaður, Tórfinn Smith, er nevniliga farin uppí samgonguna við Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

– Eg dugi ikki at síggja, at vit eru nakar bólkur longur, sigur Elin Lindenskov.

Hon fekk ikki nakað tilboð um at koma uppí borgarligu samgonguna í Tórshavnar býráð.

– Hevði eg fingið tilboðið, so hevði eg viljað kjakast um tað, men eg hevði gjørt tað einsamøll, staðfestir Elin Lindenskov.

Nevndin í Suðurstreymoyar javnaðarfelag hevði fund í gjárkvøldið, eftir at blaðið fór til prentingar.

Elin Lindenskov hevur eisini boðað stjórnini í Javnaðarflokkinum frá nýkomnu støðuni og hennara ónøð.

– Hetta er skaðandi fyri umdømið hjá Javnaðarflokkin og skaðandi fyri samstarvið í andstøðuni. Vit eru vald fyri Javnaðarflokkin og skulu umboða flokkin, sigur Elin Lindenskov.

Hon visti av, at Tórfinn Smith hevði fingið eitt tilboð um at koma uppí samgonguna, og hon skilir, at hann hevur bíðað til eftir løgtingsvalið. Tað var tó ikki við hennara góða vilja, at hon móttók eitt teldubræv sunnukvøldið, har Tórfinn Smith boðaði frá, at hann var farin uppí samgonguna.

Elin Lindenskov heldur annars ikki, at samgongan í býráðnum hevur fingið nakað sum helst burturúr. Andstøðan hevur haraftur-ímóti virkað væl.

Jan Christiansen:

# Tórfinn hevur verið positivur

**– Tórfinn Smith hevur verið positivur mótvegis samgonguni, og tí fekk hann tilboðið. Elin Lindenskov hevur ikki verið eins positiv, og fekk tí einki tilboð, sigur Jan Christiansen, nú hann hevur fingið ein samgongulim afturat**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Heri á Rógvi*



*– Hetta skuldi stabiliserað samgonguna. Nú eiga vit eisini fýra av fimm nevndarlimum í nevndunum, sigur Jan Christiansen*

**Tórshavn:** Tað var Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, sum bjóðaði Tórfinni Smith eitt pláss í býráðssamgonguni, har Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin eru.

Hesum tilboðið hevur Tórfinn Smith tikið av. Tilboðið fekk hann fyrr í ár, men hevur ikki tikið støðu fyrr enn nú.

Hitt umboðið fyri Javnaðarflokkin, Elin Lindenskov, fekk tó einki tilboð.

– Tórfinn Smith hevur verið positivur mótvegis samgonguni, og tí fekk hann tilboðið. Elin Lindenskov hevur ikki verið eins positiv, og fekk tí einki tilboð, sigur Jan Christiansen.

Jan Christiansen sigur, at tað er ein einmælt samgonga, ið hevur boðið Tórfinni uppí samstarvið.

– Hetta skuldi stabiliserað samgonguna. Nú eiga vit eisini fýra av fimm nevndarlimum í nevndunum, sigur Jan Christiansen.

Hann heldur, at samstarvið í samgonguni hevur riggað ómetaliga væl, og tað styrkir bara um samgonguna, at Tórfinn Smith nú er vorðin limur.

Mikukvøldið verður eyka býráðsfundur, har nevndirnar verða skipaðar – í øllum førum partvíst – av nýggjum. Samgongan hevur fingið sjey nýggjar nevndarsessir og andstøðan hevur mist sjey. Tískil skulu kortini blandast av nýggjum.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2,0** Diesel GX, gráur, 4 hurðar, árg. 1997, 151.000 km. | 94.000 |
| **Nissan Primera 1,6 LX**, gráur, 4 hurðar, árg. 1995, 126.000 km. | 69.000 |
| **Nissan Primera 2,0**, reyður, 4 hurðar, árg. 1991, 121.000 km. | 47.000 |
| **Nissan King Cab** 4x4 Diesel, gráur, 2 hurðar, árg. 1996. | 78.000 |
| **Peugeot 106 Diesel**, gráur, 3 hurðar, árg. 1996, 110.000 km. | 72.000 |
| **Peugeot 206 XR 1,4**, svartur, 3 hurðar, árg. 1999, 88.000 km. | 100.000 |
| **Peugeot 206 XR 1,9 D**, bronze, 5 hurðar, árg. 1999, 88.000 km. | 110.000 |
| **Peugeot 306 XS 2,0 St. Car**, ljósa bláur, 5 hurðar, árg. 1999. | 130.000 |
| **Peugeot 306 Diesel Aircon**, bláur, 4 hurðar, árg. 1999, 47.000 km. | 125.000 |
| **Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**, bláur, 4 hurðar, árg. 1994, 230.000 km. | 120.000 |
| **Opel Combo 1,4 Van**, reyður, 3 hurðar, árg. 1995. | 49.000 |
| **Opel Combo 1,4 Van**, hvítur, 3 hurðar, árg. 1997, 52.000 km. | 59.000 |
| **Opel Corsa 1,4 Swing**, bláur, 5 hurðar, árg. 1997, 58.000 km. | 69.000 |
| **Opel Astra 1,7dt Wagon**, reyður, 5 hurðar, árg. 1995. | 67.000 |
| **Opel Astra 1,6**, bláur, 5 hurðar, árg. 1995, 109.000 km. | 67.000 |
| **Opel Astra 1,7Dt**, beige, 5 hurðar, árg. 1996, 95.000 km. | 85.000 |
| **Opel Astra 1,7Dtl**, grønur, 4 hurðar, árg. 1997, 108.000 km. | 99.000 |
| **Opel Astra 1,6**, reyður, 5 hurðar, árg. 1999, 52.000 km. | 119.000 |
| **Opel Astra 1,4**, bláur, 3 hurðar, árg. 1997, 97.000 km. | 70.000 |
| **Opel Astra 2,0 Dti Wagon**, gráur, 5 hurðar, árg. 1998, 76.000 km. | 130.000 |

Sosialurin

Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61